28. januar 2005

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 1/2005

Tíð: Hósdagin 27. januar 2005, kl. 13.00-15.00

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Eivind Weyhe, megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 13/2004 setursráðsfundi 9. desember 2004.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarmál**
   a. **Býti av fíggjarjáttan 2005.** (J.nr. 0015-01365). *Fundarskjøl: Uppskot til býti, dagfest 20.1.05 og skriv frá Mentamálaráðnum um játtan 2005, dagfest 24.1.05.* Setursskrivarin gjøgnumgekk tølini og svaraði spurningum. Býtið millum løn og rakstur 87/13. Røkkur til vanliga virksemið, neyvan rúm fyri tiltøkum úr menningarætlanini. Boðini frá Mentamálaráðnum um at eingin eykajáttanarumsókn verður góðkend í 2005 tikin til eftirtektar. Uppskot til býtið staðfest. SSS sendir deildunum formliga fráboðan um býtið.
   b. **Fíggjarstøðan 2004.** Mint var á, at seinastu bókingarnar 2004 skulu gerast sum skjótast. Væntandi verður eitt lítið avlop.

4. **Íverksetan av KT-trygd. Rundskriv til almennar stovnar frá Vinnumálaráðnum um at seta í verk KT-trygd, vísandi til vegleiðingina "Bólking av krøvum í ISO 17799".** (J.nr. 0038-01511). Ráðið staðfesti avgerðina hjá rektaranum um at leggja málið til KT-leiðaran og setursskrivaran. Tey gera uppskot til limir í KT-ráðið, sum rektarin skal góðkenna.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

5. **Áheitan frá Fíggjarmálaráðnum um tilmæli til nýggjar limir í Búskaparráðið fyri Hermann Oskarsson, formann, Marner Jacobsen og Miriam Haraldsen, nevndarlimir, sum hava tikið seg úr ráðnum.** (J.nr. 0011-1092). *Fundarskjal: Uppskot til tilmæli, dagfest 20.1.2005.* Ráðið tók undir við uppskotinum. SSS avgreiðir málið.

6. **Góðkenning av metingarnevnd til ph.d.ritgerð Guðrun Gaard. Eftir tilmæli frá Føroyamálsdeildini er hendan metingarnevnd sett: Malan Marnersdóttir, professari, dr.phil. sum formaður, Idar Stegane, professari við Universitetet i Bergen og Jógvan Isaksen, lektari við Københavns Universitet. At staðfesta.** (J.nr. 0041-00664). Staðfest.

7. **Ritgerðakappingin *Dópur og navnagáva*. Freistin at lata ritgerðir inn er 15.2.05, dómsnevnd veljast. Evni til nýggja ritgerðakapping.** (J.nr. 0053-01356). Samtykt at heita á Anfinn Johansen og Jákup Reinert Hansen um at luttaka í dómsnevndini. SSS avgreiðir málið. Spurnigurin um nýggja ritgerðarkapping skal takast uppaftur á setursráðsfundinum í juni.

8. **Endurskoðan av próvtøkureglunum. Setan av arbeiðsbólki.** (J.nr. 0045-00288). Útbúgvingarkunngerðin ásetir at Fróðskaparsetrið skal gera próvtøkureglur. Eitt uppskot var gjørt fyri nøkrum árum síðani, men arbeiðið steðgaði upp, áðrenn reglurnar vóru endaliga samtyktar. Setursráðið metti ikki at tað var neyðugt við einum nýggjum arbeiðsbólki. Heitt varð á SSS um at gera eitt uppskot við støði í gamla uppskotinum og ásetingunum í útbúgvingarkunngerðini at senda deildunum. Deildirnar gera sjálvar neyðugar tillagingar sambært praksis á einstøku deildunum.

9. **Umsókn frá Náttúruvísindadeildini um leingjan av Ph.D.-verkætlan hjá Una Petersen eftir tilmæli frá vegleiðaranum Morten Sparre Andersen.** (J.nr. 0043-01006). *Fundarskjøl: Tilmæli frá Náttúruvísindadeildini, dagfest 27.1.05, umsókn frá Una K. Petersen, dagfest 20.1.05, og tilmæli frá Morten Sparre Andersen, dagfest 21.1.05.* Samtykt at ganga umsóknini á møti.

10. **Grunnur Onnu Djurhuus til áminnis um Sverra Fon. Støða takast til, um lýsast skal eftir umsóknum í ár.** (J.nr. 0073-01087). Samtykt at lýsa eftir umsóknum beinanvegin. Eiga at tøma grunnin, um nóg nógvar skikkaðar umsóknir eru. SSS avgreiðir málið.

11. **Ársfrágreiðing 2004.** (J.nr. 0018-01520). Freistin at lata tilfar inn varð sett til 1. mars 2005. Hvør deild skal hava eina grein við eins og undanfarin ár.

12. **Fyrispurningur frá UHI (University of Highlands and Islands) Millennium Institute, Orkneyoyggjum um samstarv.** (J.nr. 0012-01528). Áhugi bæði á FMD og SSD fyri at kanna møguleikan fyri samstarvi nærri. Rektarin svarar fyrispurninginum.

13. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
    a. **Fundir á Føroyamálsdeildini 16.12.2004 og 25.1.05.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.
    b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 11.1.05.** (J.nr. 0011-00012). Viðm. til punkt. 4. Innskriving til Ph.D. verju eftir grein 5. Kjak um málið, sum er sera prinsipielt. Heitt varð á SSS um at kanna málið og geva setursráðnum eitt tilmæli.

**Avgreiðslumál:**

14. **Próvdómaragóðkenningar. Eftir tilmæli frá Náttúruvísindadeildin hevur Mentamálaráðið góðkent Bergfinn Jógvan Durhuus, ph.d., lektara á H.C. Ørsted Institut sum próvdómara í *Partiellum differentiallíkningum* og Søren Christensen, ph.d., lektara á Aarhus Universitet og Silviu Lauritsen, B.S. í Software Engineering, Cand.IT-lesandi sum próvdómarar í *Verkætlan innan kunningartøkni.* At staðfesta.** (J.nr. 0026-00781). Staðfest.

15. **Nýggjur próvdómaralisti fyri tíðarskeiðið 1.4.2005-31.3.2008. Verandi próvdómaraskeið gongur út 31. mars í ár, og deildirnar eru bidnar um at endurskoða sínar listar. Setursskrivstovan biður Mentamálaráðið um góðkenning eftir tilmælum frá megindeildarráðunum. At staðfesta.** (J.nr. 0026-01525). Staðfest.

**Kunningarmál:**

16. **Mánaðarjavnar: Ultimo november 2004 nýtsla fyri alt Fróðskaparsetrið 15.306.100 kr = 83,4% og ultimo desember 2004 nýtsla fyri alt Fróðskaparsetrið 17.724.800 kr = 96,6% av játtanarkarmi uppá 18.358.000 kr.** (J.nr. 0015-01111).

17. **Frágreiðing frá Landsgrannskoðanini, sum er send landsstýrismanninum, frá vitjan 8.12.2003.** (J.nr. 0015-01276). Setursskrivarin las niðurstøðuna upp. Mentamálaráðið hevur biðið rektaran um viðmerkingar til frágreiðingina. Setursskrivarin svarar vegna Fróðskaparsetrið.

18. **Ruskskiljing, pappírendurnýtsla. Heitt verður á allar deildir at skilja køksruskið og pappírið soleiðis, at pappírið fer til endurnýtslu.** Samtykt at heita á Býráðið um at fáa grøn íløt til pappírsburturkast.

19. **Náttúruvísindadeildin latið Statoil fjórðu støðufrágreiðing uppá verkætlanina "High level Faroese expertise targeted at the offshore industry".** (J.nr. 0043-00186).

20. **Útgávur:**

a. **Fiskiskapur við Føroyar í 100 ár, úrdráttir úr hagtølum frá ICES. Fiskirannsóknarstovan 2004.**
b. **Árið hjá fiskimonnum, ársfrágreiðing Føroya Fiskimannafelags fyri 2004.**
c. **Bridging from technology to society. Danmarks Tekniske Universitet 2004.**
d. **Tíðindabrævið Hugin & Munin 1/2004, Granskingarverkætlan fyri Økismenning.**
e. **Greinir úr italska tíðarritinum Il Polo: Cesare Pitto "Lo sguardo da vicino: Calabria – Isole Føroyar. Propeste operative per un itinerario di antropologia delle contemporaneità" og Gianfranco Contri "Su alcuni aspetti concernenti la compilazione di un piccolo dizionario faroese-italiano".**

Frágreiðing: Annika Sølvará